# Høgni miðskeiðis í feltinum

Millum tey 17.500, sum um vikuskiftið tóku lut í Bikebeinerrittet, sum er fjallasúkklukapping, í Noreg, var eisini Høgni Rúnason Øster. Talan er um ein tein upp á 94 kilometrar úr Rena til Lillehammer, og 14.460 av teimum, sum byrjaðu, vunnu seg allan vegin fram. Av teimum gjørdist Høgni nummar 6.731, og var tíðin hjá honum 4 tímar, 39 minuttir og 9 sekund. Hetta er nakað verr tíð enn tað, sum Høgni megnaði í fjør, men tað kemst fyrst og fremst av, at líkindini til kappingina í ár vóru stak vánalig.



# Nýtt met til Randi

Í seinastu kapping hetta kappingarárið gjørdu limirnir í hvirluni ein ordans vørr og settu sera nógv persónlig met og harafturat bleiv tað til eitt føroyskt met. Mest sum allir yngru luttakararnir settu nýggj met, og hjá teimum vaksnu var talan um fleiri persónlig met, og Meifríð er nú einans 28 cm frá føroyska metinum í diskuskast sum Ingibjørg Poulsen setti fyri sjey árum síðani. Helgi Geyti gjørdi heldur ikki mætari enn at hann kastaði 2 kg diskin longur enn 1,5 kg diskin. Dagsins úrsliti stóð Randi Kúrberg tó fyri, tí at hon megnaði at betra um tað føroyska metið í kasti 5-kampi soleiðis at tað nú er 2702 stig.



Fyri triðju ferð skal Kappingarnevndin taka støðu til, um tað er rætt at loyva flytingini av spæliloyvinum hjá Christiani Restorff Mouritsen, hóast sáttmáli og áheitanin um leysgeving ikki varð sent inn til tíðina

# Mouritsen aftur í Kappingarnevndina

**Starvsnevndin hjá Fótbóltssambandinum gjørdi í gjár av, at málið um spæliloyvið hjá Christiani Restoff Mouritsen skal viðgerast av nýggjum í Kapppingarnevndini**




Jákup Mørk

Málið um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen er enn ikki endaliga avgreitt.

Síðani Kappingarnevndin á fundi tann 21. august gjørdi av at flyta spæliloyvið gjøgnum undantaksregluna í grein 17.5 í Kappingarreglunum, hevur KÍ í fleiri umførunum gjørt vart við sína ónøgd um avgerðina. Í fyrsta umfari til Kappingarnevndina sjálva, og síðani í skrivi til Starvsnevndina, sum hartil fekk áheitan frá 12 feløgum um at virða reglurnar fyri flytingargluggan.

Starvsnevndin hjá FSF hevði fund um málið í gjár, og her varð avgjørt, at málið skal viðgerast av nýggjum í Kappingarnevndini.

- Har er ein áheitan komin frá 12 feløgum, og hana hava vit tikið til eftirtektar. Niðurstøðan var tí, at málið er beint aftur í kappingarnevndina, sigur Niklas á Líðarenda, varaforseti hjá FSF.

Um so er, at Kappingarnevndin kemur til ta niðurstøðu, at spæliloyvið ikki skuldi verið flutt, fær hetta tó neyvan ávirkan á dystin millum, B36 og KÍ. Ein dyst, sum B36 vann 3-0.

Grein 14.3 í Kappingarreglunum staðfestir nevnliga, at er spæliloyvið útflyggjað, er spælarin at rokna sum lógligur.

Í viðmerkingunum til greinina verður sagt, at uttan mun til um flytingin hevur verið samsvarandi reglunum ella ikki, er leikarin at meta sum lógligur leikari fyri felagið, tá FSF hevur útskrivað honum loyvisbræv. Og tí kemur neyvan upp á tal, at ein møguliga broytt niðurstøða frá Kappingarnevndini fær nakra sum helst ávirkan á dystin, sum varð spældur tann 23. august.

# Fakta um Vodafone-deildina

**EB/Streymur – NSÍ 2-2 (1-0)**
**1-0:** Dánjal Davidsen 37.
**1-1:** Christian Høgni Jacobsen 49.
**2-1:** Arnbjørn Hansen 72.
**2-2:** Christian Høgni Jacobsen 80.
**Dómari:** Bárður Mortensen
**Hjálpardómarar:** Jens A. Simonsen og Johnleif Gerðisá
**EB/Streymur:** René Tórgarð - Bárður Olsen (Alex Dos Santos, 88.), Egil á Bø, Dánjal Davidsen, Leif Niclasen - Hans Pauli Samuelsen, Brian Olsen (Pauli G. Hansen, 80.) Sorin Anghel, Marni Djurhuus (Pætur Dam Jacobsen, 67.), Levi Hanssen - Arnbjørn T. Hansen
**Gult kort:** Egil á Bø
**NSÍ:** Meinhardt Joensen - Jónhard Frederiksberg, Óli Hansen, Jens Joensen, Einar T. Hansen - Bogi Løkin, Jann Ingi Petersen, Jústinus R. Hansen, Jann Martin Mortensen (Klæmint Olsen, 80.) - Christian Høgni Jacobsen, Karoly Potemkin
**Gult kort:** Karoly Potemkin

## vodafone deildin

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 22 | 14 | - | 6 | - | 2 | 51 | 28 | 23 | 48 |
| 2 EB/S | 22 | 11 | - | 5 | - | 6 | 44 | 28 | 16 | 38 |
| 3 B68 | 22 | 10 | - | 6 | - | 6 | 43 | 37 | 6 | 36 |
| 4 NSÍ | 22 | 10 | - | 5 | - | 7 | 46 | 37 | 9 | 35 |
| 5 Víkingur | 22 | 10 | - | 5 | - | 7 | 40 | 31 | 9 | 35 |
| 6 AB | 22 | 8 | - | 6 | - | 8 | 25 | 26 | -1 | 30 |
| 7 ÍF | 22 | 6 | - | 5 | - | 11 | 32 | 40 | -8 | 23 |
| 8 B36 | 22 | 5 | - | 6 | - | 11 | 26 | 42 | -16 | 21 |
| 9 07 Vestur | 22 | 4 | - | 6 | - | 12 | 33 | 51 | -18 | 18 |
| 10 KÍ | 22 | 4 | - | 6 | - | 12 | 25 | 45 | -20 | 18 |

**Formbarometrið**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 13 | 4 | 9 | 14 |
| 2 HB | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 13 |
| 3 EB/S | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 13 |
| 4 07 Vestur | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 11 | 9 | 2 | 10 |
| 5 NSÍ | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 12 | 12 | 0 | 8 |
| 6 ÍF | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 12 | 17 | -5 | 7 |
| 7 Víkingur | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 10 | 12 | -2 | 5 |
| 8 B68 | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 8 | 12 | -4 | 5 |
| 9 B36 | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 6 | 11 | -5 | 4 |
| 10 KÍ | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 5 | 16 | -11 | 4 |

## Máltindurin

**Vodafone-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| Ahmed Keita | B68 | 14 |
| Finnur Justinussen | Víkingur | 14 |
| Andrew av Fløtum | HB | 13 |
| Arnbjørn Hansen | EB/S | 12 |
| Karoly Potemkin | NSÍ | 12 |
| Jens Erik Rasmussen | 07 Vestur | 10 |
| Rógvi Poulsen | HB | 8 |
| Andy Olsen | ÍF | 8 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen | 07 Vestur | 7 |
| Bjarni Jørgensen | HB | 7 |
| Fróði Benjaminsen | HB | 7 |
| Milan Kuljic | HB | 7 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 7 |
| Jóan Símun Edmundsson | B68 | 6 |
| Kristoffur Jacobsen | KÍ | 6 |
| Bogi Løkin | NSÍ | 6 |
| Óli Hansen | NSÍ | 6 |
| Andreas Lava Olsen | Víkingur | 6 |
| Tamba Yarjah | 07 Vestur | 5 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 5 |
| Levi Hanssen | EB/S | 5 |
| Sorin Anghel | EB/S | 5 |
| Balazs Sinko | ÍF | 5 |
| Súni Olsen | Víkingur | 5 |

Toppskjúttin í Vodafone-deildini fær eftir kappingarárið handað gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti